## Serbisk stjørnuleikari er imponeraður

Serbiski Petar Nenadic, ið hevur spælt við so mætum felagi sum Barcelona úr Spania, men seinastu seks mánaðirnar hevur spælt við spanska felagnum Algeciras, heldur at Serbia ikki spældu sín besta dyst leygardagin í Havn, men hann heldur at føroyska liðið spældi væl, og at serliga málmenninar hjá føroyingum vóru ein kleppur um hálsin á serbisku stórskjúttunum.

# á Hálsi



*Heini í hornatøkum við Stojkovic, ið fekk burturvísing, fyri harligt spæl*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

at halda áfram við at senda landslið út til slíkar kappingar.

- Vit eiga heilt víst, at senda landslið okkara út til tílíkar kappingar í framtíðini. Og eisini tey yngru liðini og kvinnulandsliðið. Ungdómsliðini mugu ikki verða eftirbátar í stóra spælinum, tí har verða lunnar lagdar fyri framtíðini. Man má fyri alt í verðini ikki gloyma tey ungu, sigur ein rættuliga avgjørdur Kári Mortensen, ið eisini hevur verið virkin í landsliðshondbólti, uttanfyri vøllin.

### Tíðin í Hondbóltsambandinum

Kári Mortensen kom inn í nevndina í Hondbóltsambandinum í 1994, tá hann vildi vera við til at byggja upp ein leist, har møguligt var hjá øllum landsliðum at vera við í altjóða kappingum, eisini unglinga- og kvinnulandsliðunum.

Longu árið eftir í 1995 var byrjað uppá miðvíst ungdóms landsliðsarbeiði, og tá veddingarpengar, av fyrsta sinni komu í 1996 (uml 700 túsund krónur blaðm.), var gamaní hjá nevndini at arbeiða, og í ár 2000 vóru Føroyar umboðaðar á øllum pallum í altjóða høpi. Nevndin vísti, at varð rætt farið um, og rætt og raskt fólk var tilknýtt arbeiðinum, kundi væl bera til at reka landsliðshondbólt, á væl breiðri palli, enn í dag. Áhugavert var at síggja, at hetta maldi runt, og ikki gav stórt hall. Tí er tað so ómetaliga týdningarmikið, at hetta arbeiði kemur í gongd aftur, ongantíð ov skjótt, sigur Kári Mortensen, ið saman við kendum nøvnum, sum Eyðfinn Egholm og Hanus Joensen (pápa Heina Hanusarsson blaðm.) og mongum øðrum, vóru profilarnar á liðunum í 1976 og 1980, ið spældu C-HM í ávíkavist Portugal og heima í Føroyum.



*Kári Mortensen, ein av stóru profilunum á liðnum, ið spældi í '76 og '80*

*Mynd: Álvur Haraldsen*